Fróðskaparsetur Føroya

3.september 2009

**Fundarfrágreiðing til stýrisfund nr. 6/2009**

| | |
|---|---|
| Dagur og klokkutíð: | Týsdagin 1. september kl. 09.00 – 16.00 og mikudagin 2. september 2009 kl. 09.00 – 12.15 |
| Fundarstað: | Náttúruvísindadeildin |
| Til staðar: | Herálvur Joensen, stýrisformaður, Jan Mortensen, næstformaður, Tove Bull, Juanna Joensen, Winny í Pætursastovu, Robert (Jim) Brown, Anni Djurhuus, Jóan Pauli Joensen, rektari og Rúna Hjelm, fyrisitingarstjóri.<br>Hugin Skaalum, fíggjarleiðari, var til staðar undir viðgerðini av málunum 4 og 5. |

**Dagsskrá 1. september:**

1. **Stýrið skipar seg.** (J.nr. (3) 10-01-20070018).
Stýrið skipaði seg við Herálvi Joensen sum stýrisformanni og Jan Mortensen sum næstformanni.

2. **Góðkenning av fundarfrágreiðing 5/2009 til stýrisfund 6. og 7. mai 2009.**
Fundarfrágreiðing 5/2009 varð góðkend.

3. **Góðkenning av dagsskrá.**
Dagsskráin varð góðkend við broytingum. Pkt. 15 og 8 vórðu flutt fram til til ávikavist pkt. 5 og 6, og pkt. 14 varð flutt til pkt. 20 á dagsskránni.

4. **Fíggjarstøðan 2009.** (J.nr. (3) 10-12-20070011).
Fíggjarleiðarin legði fram frágreiðingina um fíggjarstatus fyri 2009. Frágreiðingin varð tikin til eftirtektar, men stýrið legði dent á, at leiðslan hevur vakið eyga við teimum rakstrarstøðum, sum í framskrivingunum tykjast hava trupult við at halda játtanina. Serliga eigur leiðslan at tryggja sær, at eksternu inntøkurnar hjá Granskingardeplinum fyri Samfelagsmenning verða goldnar í hesum árinum ella í hvussu er kunnu inntøkuførast í verandi fíggjarári.

5. **Kunning um uppskot til fíggjarætlan fyri 2010.** (J.nr. (3) 10-11.01-20070008).


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

Fyrisitingarstjórin kunnaði stýrið um uppskot til fíggjarætlan fyri 2010, sum varð sent til Mentamálaráðið miðskeiðis í juli 2009. Undir viðgerðini kom fram, at stýrið ynskir at styrkja eftirlitið við fíggjarætlanini á Setrinum. Skotið varð upp, at Setursskrivstovan ger eina mannagongd fyri eftirlit við fíggjarjáttanunum hjá deildunum. Eisini skal ein arbeiðsbólkur setast, sum skal arbeiða við felags mannagongdum fyri granskarafrí. Uppskot til fíggjarætlan varð tikið til eftirtektar.

6. **Mannagongdir fyri fíggjarlógararbeiði.** (J.nr. (3) 10-10-20070004).
Stýrið hevði hesar viðmerkingar til uppskotið til mannagongd fyri fíggjarætlan, býti og stýring:

- Í sambandi við fíggjarlógararbeiðið viðger stýrið uppskot til fíggjarætlan fyri komandi ár á ársins fyrsta stýrisfundi. Á hesum fundinum verða raðfestingar fyri komandi ár gjørdar, sum tað síðani verður kunnað um á deildunum.
- Í sambandi við at leiðslan á Fróðskaparsetrinum biður deildirnar um at gera metingar fyri komandi fíggjarár, verða deildirnar kunnaðar um raðfestingarnar hjá stýrinum.
- Uppskot til fíggjarætlan verður endaliga samtykt á seinasta stýrisfundi áðrenn summarfrítíðina.

7. **Reglugerð fyri stýrið á Fróðskaparsetrinum og fyri stýrisarbeiðið.** (J.nr. (3) 10-00-2007009).
Samtykt varð, at stýrið arbeiðir víðari við reglugerð fyri stýrisarbeiðið.

8. **Samsýning til stýrislimir.** (J.nr. (3) 10-01-20070018).
Mentamálaráðið (MMR) hevur sent eitt uppskot um stýrissamsýning til Fróðskaparsetrið, sum stýrisformaðurin tekur upp aftur við MMR.

9. **Uppskot til viðtøkur fyri Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning.** (J.nr. (3) 10-03-20070005).
Mentamálaráðið hevur gjørt eina niðurstøðu viðvíkjandi støðuni hjá Granskingardeplinum sum partur av Fróðskaparsetrinum. Í einum brævi dagfestum 31. august 2009 verður millum annað sagt, at Granskingardepilin er lagdur afturat Fróðskaparsetrinum sum ein integreraður partur av fyrisiting og virkseminum á stovninum, og at Mentamálaráðið tí ikki metir, at tað er neyðugt, at Granskingardepilin hevur serstakar viðtøkur. Við hesum uppskoti frá MMR metir stýrið, at málið um viðtøkur fyri Granskingardepilin er avgreitt.

10. **Framtíðar bygnaður á Fróðskaparsetrinum.** (J.nr. (3) 10-00-20070013).
Rektarin legði fram tvey arbeiðsupprit sum eina byrjan til grundarlag undir kjakinum um broytingar í framtíðar bygnaði á Fróðskaparsetrinum. Tað eina skjalið vísti bygnaðin á Setrinum í dag, meðan hitt skjalið vísti møgulig vísinda- og lærarastørv á Fróðskaparsetrinum í einum framtíðarbygnaði.

Stýrið er samt um, at samanleggingin av Fróðskaparsetrinum, Læraraskúlanum og Sjúkrarøktarfrøðingaskúlanum eigur at føra til annað og meira enn tað, at einstøku eindirnar liva egna tilveru, sum um einki er hent. Kjakið bendi á, at stýrislimirnir sum heild ímynda sær ein betur samskipaðan bygnað, øktar møguleikar fyri tvørgangandi undirvísing og gransking, eina samskipaða fyrisiting, umframt sum frá líður at skapa eitt veruligt felags lestrarumhvørvi.

Niðurstøðan av kjakinum varð, at stýrið ynskir:

- At seta í verk eitt innanhýsis arbeiði við atliti at samskipaðum bygnaði fyri Setrið,

- At leiðslan (rektarin og fyrisitingarstjórin) í samspæli við dekanarnar setur arbeiðsbólk við umboðum fyri allar megindeildir, sum skal lýsa bygnaðarligu møguleikarnar,
- At leiðslan ger eitt uppskot til kommissorium, sum greitt tilskilar, at stýrið ætlar, at endaligi bygnaðurin skal hava færri megindeildir enn verandi bygnaður,
- At arbeiðsbólkurin somuleiðis skal lýsa framtíðar fyrisitingina á Fróðskaparsetrinum, m.a. eisini innihaldið í dekanstørvunum sammett við fyrisitingina annars,
- At arbeiðsbólkurin skal hava ein fastan skrivara, sum kann skaffa upplýsingar, tryggja framdrift í arbeiðinum o.a.

Leiðslan skal lata stýrinum setningin hjá arbeiðsbólkinum til góðkenningar, áðrenn arbeiðið verður sett í verk. Tilskilað verður, tá ið arbeiðið verður sett í verk, at talan er um arbeiði, sum er íblástur til stýrið í sambandi við, at stýrið komandi vár tekur støðu til nýggjan bygnað fyri Fróðskaparsetrið.

Lýsing av bygnaðarligu møguleikunum eigur – eins og áður umbiðið strategiarbeiði (sí pkt. 15) – at verða liðugt í viku 6 2010.

**11. Vararektari og varafyrisitingarstjóri á Fróðskaparsetrinum.** (J.nr. (3) 10-20-20070007).
Eftir tilmæli frá rektaranum setir stýrið Súsonnu Mortensen, dekan og rektara á Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya til vararektara á Setrinum. Hon verður vararektari, til stýrið tekur nýggja avgerð í sambandi við bygnaðarbroytingar. Stýrið vildi bíða við at seta varafyrisitingarstjóra, til nýggjur fyrisitingarstjóri er settur, og stýrið mælti til, at rektarin og fyrisitingarstjórin til ta tíð taka støðu til setan av varafyrisitingarstjóra. Stýrið kann verða kunnað um málið.

**12. Fyrisitingarstjórastarvið.** (J.nr. (3) 10-22.01-20070016).
Persónsmál. Serstøk fundarfrágreiðing.

**13. Ymisk formell viðurskifti í sambandi við samskiftið millum Fróðskaparsetrið og Mentamálaráðið.** (J.nr. (3) 10-03-20070028).
Eftir at fleiri spurningar, sum hava samanhang við samanleggingartilgongdina av Fróðskaparsetrinum, eru avgreiddir í MMR, metir stýrið ikki, at tað er neyðugt, at hesi viðurskifti verða tikin upp við MMR.

**14. Heimildir og ábyrgd hjá rektarunum á ávikavist Fróðskaparsetrinum og Læraraskúlanum.** (J.nr. (3) 10-00-20070012).
Persónsmál. Serstøk fundarfrágreiðing.

**Kunning:**

**15. Strategiarbeiðið.** (J.nr. (3) 10-11.01-20070005).
Fyrisitingarstjórin kunnaði um tilgongdina á Setrinum. Fyri at fáa meiri ferð á málið samtykti stýrið, at deildirnar fáa eina freist til viku 4 2010 til at lata stýrinum uppskot til samlaða strategiarbeiðið á Setrinum.

16. **(Uppskot til) Kunngerð um útbúgvingar á Fróðskaparsetri Føroya og uppskot til Kunngerð um útbúgving av lærarum og námsfrøðingum.** (J.nr. (3) 10-00-20070007).
Stýrið tók kunningina til eftirtektar.

17. **Kunning um kanning, sum Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning skal gera fyri Fróðskaparsetrið.** (J.nr. (3) 10-61.01-20070002).
Í kanningini, sum Granskingardepilin er í ferð við at gera fyri Fróðskaparsetrið, verða fyrrverandi lesandi á deildunum á Fróðskaparsetrinum spurd um ymisk viðurskifti, sum hava við teirra avgerð um at búgva í Føroyum ella uttanlands at gera. Eftir at henda kanning er gjørd, er stýrið sinnað at gera eina víðari kanning við fleiri útgreinandi spurningum til fyrrverandi lesandi og møguliga eisini lesandi á Fróðskaparsetrinum í dag.

18. **Kunning um fundir 5.12.08 og 25.6.09 í KT-stýrinum.** (J.nr. (3) 10-01-20070017).
Winny í Pætursastovu kunnaði um KT-samstarvið á Debesartrøð. Kunningin varð tikin til eftirtektar.

19. **Ymiskt.**
Stýrisformaðurin kunnaði stýrið um ein fund, hann hevði havt við landsstýriskvinnuna í mentamálum og fyrisitingina í MMR 31. august 2009. Frágreiðingin varð tikin til eftirtektar.

Fyrisitingarstjórin kunnaði um eina ráðstevnu um altjóða útbúgvingarsamstarv, sum Fróðskaparsetrið saman við Uttanríkisráðnum, MMR og Altjóða Skrivstovuni hevði verið við til at skipa fyri. Frágreiðingin varð tikin til eftirtektar. (J.nr. (3) 10-68-20070029).

**Dagsskrá 2. september:**

20. **Kunning um undirvísing og gransking á Føroyamálsdeildini og á Náttúruvísindadeildini.** (J.nr. (3) 10-02-20070021 og (3) 10-02-20070022).
Ávikavist Turið Sigurðardóttir, dekanur á Føroyamálsdeildini og Hans Pauli Joensen, dekanur á Náttúruvísindadeildini høvdu framløgur um virksemið á deildunum. Stýrið nýtti høvi til at seta teimum spurningar og til kjak um framtíðaravbjóðingar, so sum samstarv millum deildir, rekruttering til útbúgvingarnar og til profilering av Setrinum.

21. **Stýrisarbeiðið.** (J.nr. (3) 10-00-20070009).
Stýrið hevði eitt kjak, um tað er neyðugt, at stýrið er sjónligt í dagliga virkseminum á Fróðskaparsetrinum. Niðurstøðan var, at tað er leiðslan á Setrinum, sum skal gjøgnumføra viljan hjá stýrinum, og at tað er sera umráðandi, at leiðslan samskiftir við deildirnar um, at tær avgerðir, sum stýrið tekur, skulu takast í álvara. Stýrið tók eisini avgerð um, at tað skal skipa fyri einum kunningarátaki í sambandi við stýrisfundin í mai 2010. Miðast skal eftir, at nýggjur bygnaður, samleiki og strategi fyri setrið kunnu verða løgd fram tá.

RH/JPJ